

# Stóravtala á Føroyaøkinum undan oljuboring

**Jan Müller**

04.11.2013 - 15:20

Oljan.fo

Oljufeløgini Statoil og eysturríkska felagið OMV kunngera í dag, at tey hava gjørt avtalu um fleiri leitiloyvi á Føroyaøkinum.

Hetta hendir nakrar mánaðir, áðrenn farið verður undir at bora tveir avbjóðandi brunnar í Føroyum komandi ár.

OMV keypir seg upp í ikki færri enn fimm loyvi hjá Statoil á Føroyaøkinum. Statoil selir seg tó ikki út úr loyvunum, men hevur ein ognarpart á 35 prosent á flestu loyvum eftir, at handilin er gjøgnumførdur.

Í altjóða tíðindaskrivi frá Statoil, sigur Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil í Føroyum:

"Hetta er ein liður í, at vit sum felag royna at fáa sum best burtur úr loyvunum vit hava ymsastaðni í heiminum. Vit bjóða OMV vælkomnum sum samstarvsfelag, og vænta gott samstarv í arbeiðinum við at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri kolvetnum á Føroyaøkinum. Statoil er framvegis størsti loyvishavarin á føroyskum øki, og fyrireikingarnar at bora tveir brunnar komandi ár eru í gongd."

Hendan avtalan um Føroyaøkið er ein liður í eini størri avtalu, sum oljufeløgini bæði hava gjørt. Avtalan umfatar eisini ognir í Bretlandi og Norra.